# EIN skúladepil




*Nógv kann gerast og nógv er longu gjørt fyri at betra um skúlaumhvørvið í Klaksvík. Her er Gunvá við Keldu á rundvísing í Tekniska skúlanum saman við skúlastjóranum, Rúna Heinesen*

## Samstarv hóast spjaðing

Ein av stóru trupulleikunum, tá talan er um skúlar í Føroyum, er plaseringin: Hvat skal tann og tann skúlin liggja?

Hetta dugir Gunvá við Keldu væl at síggja trupulleikan við, nú tekniskur skúli bæði er í Havn og í Klaksvík, og at ein nýggjur Fiskivinnuskúli í løtuni verður bygdur í Vestmanna.

- Hóast onkur vil kalla hetta forðingar at skúlarnir liggja spjaddir, ber eisini til at síggja møguleikarnar í hesum. Tí, hvat forðar skúlunum í at samstarva?!, spyr hon.

Eftir hennara sannføring eigur ein ikki at órógva ein skúla, tá hann nú einaferð er lagdur í eitt ávíst øki. Er hann lagdur á eitt stað, eigur hann at verða liggjandi har, soleiðis at komandi næmingar vita, hvar teir skulu í skúla.

- Eg gangi ikki inn fyri at ein skipar skúlarnar eftir eini zig-zag-loysn, bara soleiðis sum tann politiski hugsanin er tá.

Men fekk ein lagdan ein skúla innan hotell- og matstovuøkið her í Klaksvík, so átti ein sjálvandi at kunna drigið Fiskivinnuskúlan í Vestmanna uppí undirvísingina, vísir Gunvá við Keldu á.

ein so góðan tekniskan skúla her, kundi ein til dømis lagt henda skúlan í forlongilsi av skúlanum ella í nánd av honum.

- Hetta er sjálvandi ein hugsan hjá mær, men eg trúgvi at hetta kundi gjørt sítt til, at vit fingu eitt veruligt útbúgvingarumhvørvi her í Klaksvík, slær hon fast.

Í einum slíkum depli er møguleiki at skapa eina synergi-effekt, bæði hjá lærarunum, men so sanniliga eisini hjá næmingunum.

- Og eingin ivi er um, at ein við einum slíkum skúladepli hevði gjørt skúlagongdina munandi meiri áhugaverda, sigur Gunvá við Keldu.

### Eldsálir

Enn eru hesi hugskotini hjá Gunvá bert hugskot á pappírinum, men hon sigur kortini, at tey hava verið uppi og vent í teirri politisku skipanini.

Sjálv hevur hon sína tilráðing um, hvussu ein skal arbeiða víðari við hesum og hvussu ein kann koma á mál. Og her koma royndirnar við teimum eldsálunum, sum frammanundan hava avrikað so nógv og ment býin til tað, sum hann er í dag.

- Tað sum ein nú eigur at gera, er at savna nakrar eldsálir sum brenna fyri at menna hetta økið, og at ein síðani fær felt nakað ítøkiligt niður á blað, og um hvussu ein hugsar sær at ein slíkan ætlan kann verða framd.

- Her kundi ein tikið fólk úr okkara kommunala øki, landspolitiskt og ikki minst úr tí fakliga økinum. Á henda hátt kundi ein fingið ta besta úrslitið burturúr, er Gunvá við Keldu sannførd um.




*Næmingar úr øllum landinum koma longu nú til Klaksvíkar at ganga í skúla. Her síggjast tríggir ungir mans úr Hoyvík í samrøðu við býráðslimin úr KLaksvík*

## Eitt stað at búgva í

**Ein avgjørt treyt fyri einum skúladepli og einum skúlaumhvørvi í Klaksvík er møguleikin hjá teimum ungu lesandi at kunna búseta seg í økinum.**

**Gunvá við Keldu hevur gjørt sær sínar hugsanir um bygging av einum bústaði til tey lesandi – einum kollegium, sum tað kallast.**

**- Eitt uppskot um eitt slíkt kollegium var frammi fyri eini 20 árum síðani. Eg meini, at tað liggur eitt mál um hetta í býráðnum, men eg veit ikki hvussu langt ein kom við tí.**

**- Men eg kann so altíð kanna málið, fyri at vita hvat grundarlag var fyri ætlanini, um tað bara var ein ætlan ella um eitt skitsuprosjekt varð gjørt. Ella um ein veruliga kom so langt sum til at gera eina kostnaðarmeting av eini slíkari bygging, greiðir hon frá.**

**Á Tekniska skúla er knýtt eitt skúlaheim, og Gunvá dugir tí væl at síggja møguleikarnar fyri at ein savnar ung, sum eru undir ymiskum útbúgvingum á einum og sama staði.**

**- Hetta hevði uttan iva skapt eitt munandi meiri áhugavert og tvørfakligt kollegium, sigur hon.**

**Nevnast kann haraftrat, at um so var at eitt slíkt kollegium verður bygt í nánd av Tekniska skúla so hava næmingarnir bert fáir hundrað metrar til svimjihøllina, ítróttarhallirnar, biograf og næstu handlarnar.**